


# 13 fólk færri

**FÓLKATAL** Fyri hálvum øðrum mánaði síðani búðu 1314 fólk á Sandoynni. Hetta eru 13 færri enn við ársskiftið

Snorri Brend

**Sandoy:** 0,94 prosent!

So stór – ella lítil – er afturgongdin av íbúgvum í oynni hesar seinastu níggju mánaðirnar.

Tað vísa nýggjastu hagtølini frá Hagstovuni, tá tað snýr seg um gongdina í fólkatalinum kring landið.

Fyri Sandoynna er støðan hon, at burðaravlopið er negativt - minus fimm – og tað sama er galdandi fyri nettoflytingina, sum er minus átta higartil í ár.

Tann bygdin sum hevur merkt mest til hesa afturgongdina er Sandur, har tað í løtuni búgva 549 fólk, ímóti 557 fólkum við ársskiftið.

Sandoyggin er haraftrat einasta økið í landinum við negativum burðaravlopi, sum merkir, at fleiri fólk doyðu enn tað vórðu fødd.

### Ikki Skopun

Verður hugt eftir bygdunum í oynni so sæst, at allar hava havt afturgongd í fólkatalinum, undantikið Skopun.



## MINKAR

***Við ársskiftið búðu 41 fólk í Dali, men tað er nú minkað við einum, niður í 40 fólk. Hetta er samstundis minsta tal av íbúgvum seinastu 25 árini***

Við ársskiftið vóru tey 486 skopuningar í tali, og tað var eisini sama tal av fólki við ársskiftið.

Í triðstørstu bygdini, Skálavík er fólkatalið minkað við trimum – úr 164 niður í 161, meðan fólkatalið í Húsavík er lækkað við einum, niður í 78.

Sama gongdin sæst aftur í grannabygdini, Dalur, har fólkatalið við ársskiftið var 41 og er nú komið niður á 40.

Nevnast kann, at hesar fyrstu níggju mánaðirnar í ár, eru seks børn borin í heim á Sandoynni – trý í Skopun og trý á Sandi.